Frode Bay

Men tað hendi í teim døgum

Leikur á palli ella í kirkju

Týtt: Sonja Sørensen

Eitt sindur um sjónleika-venjing við børnum

Fyrst verður leikurin lisin upp í síni heild. Roynt verður at gera leikin so spennandi hjá børnunum sum gjørligt.

Síðani verður ein mynd vand í senn. Børnini kunnu spæla ein part nakrar ferðir við ongum handriti (improvisatión), har børnini skiftast at hava teir ymsu leiklutirnar. Um lærarin velur »skeivt« fyrstu ferð, kann tað verða trupult at skifta seinni og ikki særa okkurt av børnunum.

Tá ið børnini hava spælt leikin nakrar ferðir og hava *skilt gongdina* í leikinum, verða leiklutirnir ásettir og handrit býtt út. — Nú verður heitt á børnini um at læra seg leiklutin uttanat.

Nú er so at vóna, at børnini sjálv duga at síggja, at summi hóska best til ein leiklut, onnur til onkran annan.

Tað hevur eisini stóran týdning at fáa børnini at skilja, at allir leiklutir eru týdningarmiklir; tey, sum arbeiða aftanfyri á pallinum, har alt skal gerast stundisliga og stillisliga, hava eins stóran týdning og tey, sum standa á palli.

Tað er heldur ikki bara tey, sum siga okkurt beint nú — ella skulu siga nógv í leikinum — sum eru týdningarmikil. Ein, sum hevur ein lítlan leiklut, kann leggja nógv afturat leikinum, um hann spælir væl í røttu løtu. Ein, sum hevur ein lítlan leiklut, kann taka nógv frá leikinum, um hann dregur ov nógv eygu at sær, tá ið hann ikki skal.

Fyrstu ferð, ið vant verður rættiliga á palli, skulu børnini læra at arbeiða aftan fyri pallin og ikki larma. Tað loysir seg at brúka nógva tíð til at venja hetta.

Royn skjótast gjørligt at áseta, hvar leikarin skal ganga og standa, tá ið hann skal siga okkurt. Tá festa setningarnir seg betur, og leikararnir vera tryggari.

Ven børnini frá byrjan at venda sær ímóti áskoðarunum, tá ið tey tosa, og at tosa *nógv* harðari og týðiligari, enn tey halda seg skulu.

Hini børnini kunnu fara oman í salin at eygleiða og lurta, um tað hoyrist nóg væl.

Royn at fáa børnini *ikki* at skunda sær. Onkuntíð hevur tað, at steðga á, mest at siga.

Hetta er jólaleikur um Kristi føðing. Leikurin hevur hátíðardám. Høvundurin er prestur og væl kendur við bíbliu og sálmar. Eg havi valt hóskandi sálmar úr føroysku sálmabókini, men lærarin kann eisini velja aðrar sálmar, sum næmingarnir eru kunnugir við.

Í leikinum eru 12 leikarar og eitt kór. Í endanum á leikinum koma einglar inn á pallin. Tað ber væl til at lata tey, sum syngja, vera einglar. Hetta fellur væl í tráð við einglasangin í 3. mynd.

Týðarin

Uppskot um sálmar:
Undan 1. mynd: Sálmabókin nr. 45: Ver vælkomið, Harrans ár. 1. ørindi.
Eftir 1. mynd: Sálmabókin nr. 50: Upp, gleðist allir. 1. ørindi.
Eftir 2. mynd: Sálmabókin nr. 66: Lov tær, Jesus. 1. 2. og 5. ørindi.
Eftir 3. mynd: Sálmabókin nr. 67: Í Betlehem í Dáviðs stað. 2. og 3. ørindi.
Seinast í 4. mynd, meðan vísmenninir koma inn: »Skrúðgongusálmurin« *(aftast)*
Eftir 4. mynd: Sálmabókin nr. 53: Eitt barn er føtt í Betlehem

	Leiklutir:
1. mynd: *Maria og Jósef í Nazareth*	Maria _____
	Jósef _____
2. mynd: *Maria og Jósef koma til Betlehems*	Maria _____
	Jósef _____
	Benaja _____
	Jóhanna _____
3. mynd: *Hirðarnir á markini*	Isaj _____
	Joakim _____
	Elifas _____
	Tobias _____
	Eingil _____
	Kór
4. mynd: *Barnið í krubbuni*	Benaja _____
	Jóhanna _____
	Maria _____
	Jósef _____
	Hirðarnir _____
	Vísmenninir _____
	Einglar _____
	Kór

1. partur

Maria og Jósef koma inn hvør sínu megin, Maria ber eina vatnkrukku.

Maria: Kemur tú longu til hús, Jósef! Maturin er liðugur. Hygg, eg havi verið í ánni eftir vatni.

Jósef: Nú verður tað skjótt ov strevið hjá tær at bera hasa tungu krukkuna, Maria. Tú skuldi havt onkran at gjørt tað fyri teg.

Maria: Einki er ov tungt hjá mær, Jósef. Víst beri eg eina byrðu, sum tyngist hvønn dag, men tað er, sum ber henda byrða meg. Frá tí degi, tá ið eingilin segði við meg, at eg var Guds útvalda at føða son hansara, hevur sál mín verið ljós og løtt, og eingin byrða ov tung.

Jósef: Sum tú ert vøkur, sum tú stendur har, og eyguni glitra hvørja ferð, tú tosar um barnið títt. Og sum tað var gott, at ein maður í Nazareth skuldi hava ein timburmann úr Betlehem at smíða hús hjá sær, so at eg fann teg. Nú eru húsini næstan liðug.

Maria: Vit hava púra gloymt matin. Tú manst vera svangur.

Jósef: Ja, nú fer títt frálíka breyð at gagnast mær væl. Og hvat síggi eg? Fikur og vín!

Maria: Ja, hatta er úr víngarðinum hjá pápa.

Jósef: So er tað gott vín, veit eg. Vit mugu takka Guði fyri gávur hansara. »Eg takki tær Guð, kongur mín. Tú letur upp hond tína og mettar alt livandi. Amen.«

Men eg má siga tær frá nøkrum, sum eg ikki eri so glaður um, Maria. Í kvøld, sum eg stóð og prátaði við Hiram, sum eg smíði hús hjá, kom Urias tollarin, gangandi. Hann segði okkum, at keisarin í Róm hevur givið boð um, at allur heimurin skal verða skrivaður í manntal. Í øllum teim londum, sum hann ræður yvir, skal ein og hvør fara til ættbygd sína og lata seg skriva á skattalista har.

Maria: Men so skalt tú til Betlehems. Ja, men Jósef! Eg má koma við tær.

Jósef: Mær dámar hetta einki. Tað verður alt ov strevið hjá tær — ferðin varir minst tríggjar dagar. Men eg ætli mær at keypa eitt esil.

Maria: Tað man fara at ganga! Og vit munnu fara at finna ein bústað í Betlehem.

Jósef: Ja, eisini um tað skuldi verið fult á herberginum, tí eg eigi nógvar vinir og frændur í Betlehem, og teir munnu taka væl ímóti okkum — og syrgja væl fyri tær, um nú tíðin kemur, meðan vit eru har.

Maria: Tað vænti eg, at tað verður.

2. partur

Jóhanna situr við eitt borð øðrumegin á pallinum. Benaja kemur inn og setist yvir av henni.

Benaja: Nógv fremmandafólk eru í býnum í dag, Jóhanna.

Jóhanna: So? — Eru tað keypmenn?

Benaja: Ja, eitt keypmannafylgi er komið úr Egyptalandi, men tað er ikki alt. Tú veitst, at keisarin í Róm hevur givið boð um, at alt Ísraels fólk skal verða skrivað í manntal, hvør í sínari ættbygd. Tí koma so nógvir av Betlehems synum til býin í hesum døgum. Eg hitti nógvar gamlar kenningar á torginum í dag.

Jóhanna: Hvør var tað? Tað hevði verið hugnaligt at fingið gamlar vinir inn um gátt.

Benaja: Elifas var har, hann var komin úr Kapernaum, og Gedalja, sum arbeiðir hjá einum byggimeistara í Nain, og Gabrias, sum er útróðrarmaður. Hann býr heilt uppi í Bethsaida við Genesareth vatnið. Og so var tað....

Jóhanna; Hvat var hatta, Benaja? Tað ljóðar, sum onkur er her við húsini.

Benaja: Ja, rætt hevur tú.

Jósef og Maria koma inn.

Jósef: Guds friður í húsi.

Benaja: Harrin vælsigni teg! Men er tað ikki Jósef? Og her sótu vit og tosaðu um gamlar Betlehemittar, sum eru í býnum um dagarnar, og vónaðu, at onkur kom at vitja okkum. Og ongan vildu vit heldur sæð enn teg, Jósef! Tú kemur ivaleyst úr Nazareth, og — — — ja, vit hava frætt, at tú hevur funnið tær eina konu millum Nazareths døtur.

Jósef: Ja, tað er Maria mín.

Jóhanna: Maria, tú ert eisini vælkomin í okkara hús. Komið nú og setið tykkum! Tit mugu vera nakað móð av slíkari langferð.

Jósef: Ja, eg haldi, at Maria trongir harðliga til at hvíla seg.

Jóhanna: Bíða nú! Hava tit nakra staðni at vera? Býurin er fullur av fremmandafólki, og herbergið er ivaleyst fult. Vilja tit ikki gista her hjá okkum?

Jósef: Jú — takk, Jóhanna! Men verður tað ikki ov strevið hjá tykkum at hava okkum liggjandi.

Benaja: Her er nógv rúm í hesi tíðini, nú djórini eru úti. Hygg, í hesum endanum í húsunum búleikast djórini, her kunnu vit reiða tykkum eitt ból, um vit flyta tað, ið her stendur.

Jósef: Lat meg gera tað!

Benaja: Takk fyri. Ja, krubbuna kunnu vit seta inn at vegginum her, so er hon ikki til trongrúm.

Jóhanna: Og so breiða vit tvær seingjarmottur út her til tykkara at liggja á. Men bíða nú! Tit mugu fáa okkurt at eta. Set tú teg yvir til Benaja, Jósef, og tosa við hann um gamlar dagar, so skal eg bera matin inn. Og tú, Maria, tú skuldi komið yvir higar og lagt teg eina løtu. Tú manst treingja til at hvíla teg eftir so strevna ferð.

Maria: Takk fyri, Jóhanna! Sum tit eru blíð og umhyggin øll somul.

Jóhanna: Í slíkum umstøðum eigur tú at verða borin á lógvum.

Maria: Eg verði borin á einglaveingjum. *(hon legst)*

Jósef: Tað er gott at koma aftur til barndómsbýin. Hvussu veit við her heima?

Benaja: Vit liva friðarliga og røkja hagan og víngarðarnar og røkta seyðin. Eingin stórhending hevur verið síðani síðstu valdsgerðina hjá Heródesi kongi, men hana manst tú hava hoyrt um.

Jósef: Ja, er tað satt, sum vit hoyrdu í Nazareth, at Heródes hevur latið tveir synir sínar taka av døgum?

Benaja: Ja, tað er syrgiligt, men satt. Bæði Alexander og Aristobul máttu láta lív. Og Mariamne, móður teirra, drap hann longu, tá ið synirnir vóru smáir.

Jósef: Hvat er tað, sum fær hann til slíkar skemdargerðir?

Benaja: Hann óttast fyri, at onkur skal taka kongsvaldið frá honum, og at kongur skal koma í Ísrael, sum er størri og mætari enn hann.

Jósef: Ein kongur í Ísrael?

Jóhanna: Maria er sovnað, meðan tit hava sitið og prátað.

Jósef: Ja, hon svevur. Lat hana sova, henni tørvar svøvn. Hon er skjótt komin á tíð. Hon er so vøkur, sum hon liggur har, og tit skuldu vitað, hvussu góð hon er. Harrin signi hana og lívsfrukt hennara.

3. partur

Tveir hirðar, Joakim og Isaj, sita á steinum. Aðrir hirðar liggja og sova.

Joakim: Eg møðist ikki at hyggja at luftini. Eg haldi, at í nátt glampa stjørnurnar sum ongantíð fyrr.

Isaj: Eg haldi við tær. Manga náttina havi eg sitið her úti á markini og frøtt meg um stjørnuhimmalsins vakurleika, men ongantíð hevur hann tókt mær so ljómandi sum í hesi nátt. Eg siti og hugsi um orðini, sum Dávid sang — hann hevur helst sitið her á markini uttan fyri Betlehem og yrkt tey.

Joakim: »Lítið eg at tínum himni, fingraverki tínum, mána og stjørnum, sum tú hevur fest — hvat er tá maður, at tú minnist á hann, og mannabarn, at tær kemur tað í hug!« *(8. sálmur ør. 4 og 5)*

Joakim: Ja, tað má hava verið á hesum leiðum, at Dávid goymdi at seyði — hvussu langt síðani man tað vera?

Isaj: 1000 ár.

Joakim: So langt síðani! Er tað satt, at tú ert av Dávids ætt?

Isaj: Ja, Joakim. Eg beri eisini navnið Isaj, sum faðir Dávids. Og veitst tú, hví eg serliga fegnist um at vera av hansara ætt?

Joakim: Nei.

Isaj: Tí, at Messias skal koma av Dávids ætt.

Joakim: Messias — væntar tú, at hann nakrantíð kemur?

Isaj: Hvussu kanst tú siga soleiðis? Tú veitst, at profetarnir hava spáað, at Harrin skal senda fólki sínum ein frelsara, ein mætan kong. Minnist tú ikki orð Jesaja: »Tað fólkið, sum gongur í myrkri, skal síggja stórt ljós *(Jes. 9.2)* Tí at barn er okkum føtt, sonur okkum givin, friðarhøvdingi *(Jes. 9.6)*«

Joakim: Ja, men hví hendir einki? Hví skulu 1000 ár ganga og kanska 1000 ár afturat?

Isaj: Eg vænti ikki, at tað fer at vara leingi. Mær hevur longst eftir tí í nógv ár, men tað er, sum longsulin er vorðin friðarligari og tryggari.

Joakim: Heldur tú av sonnum, at tað fer at henda í okkara tíð?

Isaj: Ja, góði, tað haldi eg, og veitst tú, hvat eg eisini haldi? Eg haldi, at hann verður borin í heim í Betlehem. Minnist tú ikki orð profetanna: »Tú Betlehem! Frá tær skal koma mær ein, sum skal verða drottur Ísraels.«

Mítt elskaða Betlehem, Dávids staður! Er náttin aldri so long og myrk, so vita vit, at tað lýsir fyri degi. — Hygg, tað tekur longu at lýsa.

Joakim: Ja, hygg, men Isaj! Hatta er ikki sólin. Hvat er hatta ljósið?

Isaj: Á ja, hygg, hvussu tað skyggir! Allar stjørnur blikna í ljósglæmuni! Upp, brøður! Elifas og Tobias, vaknið. Komið og síggið eitt himinsundur.

Eingilin: »Óttist ikki; tí sí, eg kunngerði tykkum eini gleðiboð, sum skulu verða fyri alt fólkið. Tí at tykkum er í dag ein frelsari føddur, sum er Harrin Kristus í Dávids staði. Og hetta skulu tit hava til merkis: Tit skulu finna eitt barn reivað og liggjandi í eini krubbu.«

Englasangur: »Heiður verið Gudi í hægsta himli, og friður á jørð, og í menniskjum góður tokki.« *(Luk. 2. kap. 1.14.)*

Ella: nr. 51 í sálmabókini fyrsta ørindi: Tey boð nú ljóða himni frá: Halleluja, halleluja. Eitt barn er føtt her foldum á, Halleluja, halleluja. *(gomul føroysk sálmaløg nr. 13)*

Joakim: Hoyrdu tit, hvat eingilin segði: Í Dávids staði. Barnið er føtt í Betlehem, í okkara býi.

Isaj: Ja, lítli mín. Í Dávids staði er frelsarin føddur. Brøður, latum okkum fara til Betlehems!

4. partur

Inni hjá Benaja og Jóhonnu. Benaja situr og Jóhanna stendur øðrumegin við, hinumegin liggur Maria, Jósef situr.

Isaj: Friður verið við tykkum.

Benaja: Harrin vælsigni teg. Hvør er tað, sum kemur inn til okkara á náttartíð?

Isaj: Ja, orsakið at vit ganga soleiðis inn á tykkum. Vit sóu ljós, og so hugsaðu vit, at her fóru vit kanska at finna barnið, sum Harrans eingil talaði til okkara um.

Benaja: Barnið, sum Harrans eingil — — hvat er tað, tú sigur?

Isaj: Ein eingil kunngjørdi okkum, at frelsarin er føddur í Betlehem í nátt, og at vit skuldu finna eitt barn liggjandi í eini krubbu.

Benaja: Jú, tað er satt, at eitt barn er komið í heim í okkara húsi í nátt, og tað er eisini satt, at vit hava lagt tað í eina krubbu. Men — — Jósef og Maria! Her eru nakrir menn, sum vilja sleppa at síggja barnið, men eg skilji ikki, hvat teir siga.

Jósef: Teir siga satt. Lat teir bara koma inn!

Isaj: Takk! Komið, brøður!

Joakim: Hygg, har liggur barnið í krubbuni, soleiðis sum eingilin segði.

Isaj: Vit eru hirðar, og vit sótu úti á markini í nátt og goymdu at seyði. Joakim og eg sótu við bálið, og hinir báðir lógu og svóvu. Og brádliga skygdi ein ljósglæma á himlinum.

Joakim: Tit skuldu sæð eitt ljós, so skyggjandi hvítt.

Isaj: Vit tveitti okkum eftir rommum, men tá ljóðaði ein rødd, sum segði: »Óttist ikki,« og tá ið vit hugdu upp, stóð ein eingil har.

Joakim: Ja, tit skuldu havt sæð hann, so undurvakur var hann.

Isaj: Og hann segði okkum, at frelsarin er føddur í Betlehem í nátt.

Joakim: Og gav okkum til tekin, at vit skuldu finna eitt barn liggjandi í eini krubbu. Og har liggur barnið í krubbuni. Halda tit ikki, at tað er hetta barnið?

Maria: Jú, tit hava funnið tað rætta. Eisini vit hava fingið einglaboð.

Jóhanna: Hvat sigur tú, Maria?

Maria: Tað hendi mær tað sama í Nazareth, sum er hent tykkum í nátt. Men tað var langt, áðrenn eg átti barnið: Ein eingil stóð hjá mær og segði, at eg skuldi verða við barn og eiga son — »hann skal verða kallaður sonur hins hægsta, og Gud Harrin skal geva honum hásæti Dávids, faðirs hansara.« *(Luk. 1.32)*

Isaj: Sonur hins hægsta! — Hásæti Dávids! Er barnið av Dávids ætt?

Jósef: Ja, eg eri av Dávids ætt, og Gud hevur eisini talað til mín gjøgnum ein eingil — í einum dreymi: »Hon skal føða ein son, og navn hansara skalt tú kalla Jesus. Tað merkir frelsari.«

Isaj: Av sonnum er tað Guð, sum hevur sent okkum ein frelsara. Latum okkum falla á knæ fyri barninum.

Øll falla á knæ.

Isaj: *(sitandi ella standandi)* Ja, ljósið er komið í heimin, og tað kemur mær fyri, at tað ikki skal skína fyri Ísraels fólki eina, men fyri allari jørðini. Minnast tit orð profetanna: »Móti tínum ljósi skulu fólkini ganga, og kongar til tína skínandi glæmu.« — — — Hygg.

Øll venda sær og hyggja. Teir tríggir vísmenninir koma inn, fara yvir at krubbuni og leggja seg á knæ saman við hinum. Einglar savnast á pallinum, kórið syngur skrúðgongusálmin. (sí aftast).

Skrúðgongusálmurin


Lag: In dulce jubilo

O, stjørna, ver várt ferðaljós
kamelin bein á rætta kós.
Tú, vár órógvseldur,
halt oss á røttu leið.
Hjálp okkum glað at missa
tað, sum var okkum dýrabært.
Himnastjørna skær.
Himnastjørna skær.

O, stjørna, leið oss hiðani
frá kríggi, vald og einsemi
frá tí haturbáli,
hvørs logar fjala teg,
til stað, sum kærleik boðar,
har lógvaskálir blídliga
bera offurskál,
bera offuskál.

Leið, stjørna, oss um fjøll og lág,
lat okkum loynitekin sjá,
eingin kann at skilja,
bert okkar' sálartrá.
Ber leiðin gjøgnum tronga,
og forðagongd er framman,
lýða vit títt boð,
lýða vit títt boð.

Lag: In dulci Jubilo



E.O.Prent - Nótar